Ársætlan fyri lærugreinina

Lærari: Anita S.T.Simonsen	Flokkur: 6.	Skúlaár: 2020-21
Lærugrein: Føroyskt		
Tímar: 6		
Lærugreinaøki hetta skúlaárið: * Lesing * Stavseting * Mállæra * Skriving * Framburður		
Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið: a) Lesing: - Vit lesa ymisk tekstasløg, fyri at tann einstaki næmingurin í størri mun gerst áhugaður í at lesa. b) Stavseting: - At tey flestu orðini verða stavaði rætt, og at næmingurin gerst tilvitaður um, nær "ð" skulu setast í bundin navnorð/sagnorð, og onnur "ð"-orð. c) Mállæra: - Orðaflokkarnir verða neyvari viðgjørdir, og arbeitt verður miðvíst við at læra bendingarmynstur d) Skriving: - At næmingurin lærir at skriva bæði eftir forskriftum og frítt. At hann lærir at seta tekin í setningarnar, og at býta setningar upp. e) Framburður: - At næmingurin lærir at bera tað føroyska málið fram í flokssamrøðum men eisini í sjálvstøðugum framløgum. Harafturat arbeiða vit miðvíst við uppgávum, søgum o.ø., sum víðka um ta etisku og geografisku vitanina hjá næminginum.Ynskiligt er, at næmingurin lærir, hvussu onnur við aðrari áskoðan og mentan hugsa, og víst verður í hesum sambandi á, hvar tey búgva. Hetta fyri at næmingurin gerst betri førur fyri at møta einum fjølbroyttum heimi.		
Arbeiðsháttur: a) Lesing * Lesa heima og í skúla * Frílestur * Framhaldssøgur lisnar fyri næmingunum * Lesiskeið b) Stavseting: * Fyrisagnir, spøl, skrivibøkur, "talvu-undirvísing" o.a., har dentur verður lagdur á tær størstu avbjóðingarnar, sum eru í flokkinum. c) Mállæra: * Skrivihefti, talvu-undirvísing, fáa mállæru fyri heima o.a. verður nýtt fyri at læra mállæru.		
Tilfar og amboð: * Ævintýr: skaldskapur av manna munni og listævintýr * Veingjaða myrkrið * Tættirr: Niklas hjá Pena, Í dans, Per fór til Havnar * Sangir: "Herbergið", "Eg hoyri ongastaðni heima", "Kalli Katt" við Kára P, "Kenna tit Rasmus" við Jógvan Hansen á íslendskum, "Himnan i min famn" við Carolu Haggkvist á svenskum og "Lítla Marin" * Kom við, lesi- og skrivibók * Eldur í * Brennivargurin * Krabbabøkur		

* Torkils døtur * Teldan * Kom og skriva * Eg skrivi * Nem mál * Sjálvvalt evni innan landa- og samfelagsfrøði * Spøl og drama	
Nær verður eftirmett og hvussu: * Eftirmetingar verða gjørdar gjøgnum árið. Hvussu lærir næmingurin best? Og hvat er neyðugt at læra.*	
Latin inn: August 2020	Undirskrift lærarans: Anita S.T.Simonsen